Enska pundið fellur framvegis

Farna vikan á lánsbrævamarknaðunum hevur verið merkt av støðuni í Japan, nú val hevur verið til japanska yvirhúsið. Eisini hevur høttandi búskaparkreppan í Russlandi ávirkað heimligu gjaldoyra- og lánsbrævamarknaðirnar. Enska pundið og amerikanski dollarin eru viknað nakaðhesa seinastu vikuna.

Seinasta vikan hevur sum heild verið merkt av kurshækkingum og metlagum longum rentum á danska lánsbrævamarknaðinum. Taðer framvegis tann vánaliga búskaparliga gongdin í Asia - og avleiðingarnar av henni - sum fær kursirnar á heimligu marknaðunum at hækka.

Um vikuskiftið hevur verið val til japanska yvirhúsið. Úrslitið gerdist, at forsætisráðharrin Hashimoto tapti, og fer frá. Hetta hevði positiva ávirkan á virðisbræva - og gjaldoyra- marknaðirnar í Europa og USA, tí inntrivini, sum japanska stjórnin hevði ætlanir at seta í verk, fyri at tálma japansku fíggjar- og búskaparkreppuni, nu koma at bíða, til eftirmaður Hashimotos er funnin.

10-ára danska statslánsbrævið - 7% at lan 2007 - kostaði kl. 12 í gár 115,27 móti 115,53 fyri viku síðan. 2-ára statslánsbrævið - 6% at lan 1999 - kostaði 102,33 móti 102,35 fyri viku síðan. Tað føroyska lánsbrævið- 5% FRL 1999 - kostaði 100,15, sum svarar til eina effektiva rentu á 4,86 %.

Enska pundið lækkað

Enska pundið - GBP - viknaði nakað hesa seinastu vikuna, eftir at tað gerdist greitt, at Bank of England ikki hækkaði ta leiðandi ensku rentuna á fundinum seinasta hósdag. Undan fundinum hevur verið gitt, at enski tjóðbankin fór at hækka rentuna, tí fleiri kunngerð lyklatøl hava bent á, at fyntreytirnar fyri eini rentuhækking vóru til staðar. Hetta hevur fingið pundið at hækka hesar seinastu vikurnar.

GBP kostaði í gjar 1121,38 móti 1134,40 fyri viku síðan.

Amerikanski dollarin viknaður

Dollarin - USD - er, eins og pundið, lækkaður hesa seinastu vikuna. Orsøkin til hesa gongd er, at tyski markurin - DEM - aftur er styrknaður, eftir at IMF hevur veitt Russlandi eitt lán uppá 22 mia. dollarar og harvið byrgt uppfyri einari møguligari devaluering av tí russiska rublinum. Hetta hevur fingið íleggarar at flyta pening sín úr USD og til DEM.

USD kostaði í gár 685,27 móti 691,74 fyri viku síðan.

FØROYA BANKI













Peningamarknaðarrentur, DKK (CIBOR)	14. juli 98	7. juli 98	14. juli 97
Diskonto*	3,75%	3,75%	3,25%
1 mánaði	4,16%	4,16%	3,57%
3 mánaðir	4,17%	4,17%	3,61%
6 mánaðir	4,19%	4,19%	3,68%

Gjaldoyra	14. juli 98	7. juli 98	14. juli 97
[illegible]	685,27	691,91	683,25
[illegible]	1121,38	1134,39	1151,78
Týskur markur	[illegible]	381,09	[illegible]
Norsk króna	89,52	89,80	91,34
Franskur frankur	113,66	113,67	112,84
Japanskur yen	4,8591	4,9500	5,[illegible]

[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]

m verðliga marknaðarrentan tann ávisa dagin

Skattur í Føroyum:

Summi rinda - onnur sleppa frá

– Okkurt er heilt galið í hesum landinum, tá vinnurekandi við stórari skattaskuld sleppa at halda fram í áravís, sum um einki var hent, sigur Tórfinn Smith býráðslimur í Havn

ELI GUTTESEN

Tórfinn Smith, býráðslimur í Havn, heldur at meira má gerast fyri at forða fyri at vinnurekandi royna at snúgva sær undan skattaskuld

Hundraðtals milliónir eru útistandandi í skatti, og fyri hvønn dag, sum gongur, koma nýggjar eftirstøður.

Felags fyri nærum allar eftirstøðurnar er, at tær stava frá vinnuvirksemi av ymiskum slag.

Ein av teimum, sum óbeinleiðis sær, hvørjir persónar standa aftanfyri hesar eftirstøður, er Tórfinn Smith, býráðslimur í Havn.

Hann sær nøvnini, tá býráðið í Havn verður biðið um at ummæla møguliga eftirgeving av skattaskuld.

Umsóknin kemur fyrst til landsstyrið, og landsstyrið sendir síðan umsóknina til ummælis hjá kommunala myndugleikanum, sum eigur part av skattinum, umsøkjarin skyldar.

Vanliga er játtanin hjá landsstýrinum treytað av, at játtan fyrst fæst frá kommununi Tí verður avgerðin hjá kommunala myndugleikanum mangan avgerandi fyri, um skuldarin sleppur frá skuldini ella ikki.

Gamlir syndarar

– Tíverri er skuldin bæði gomul og stór, tá hon umsíður endar á borðinum hjá býráðnum sum umban um eftirgeving, sigur Tórfinn Smith, býráðslimur í Havn.

– Tað er ikki óvanligt, at vit fáa umsóknir frá vinnurekandi við stórari skattaskuld. Mangan hava hesir rikið vinnu í áravís uttan yvirhøvur at innlevera nakran roknskap, sigur Tórfinn Smith.

– Okkara samfelag er lítið, og tað irriterar meg at sígga umsóknir frá persónum, sum spæla stórir í dagligdegnum, og sum als ikki hava tørv á at sleppa undan síni skattaskuld, sigur Torfinn Smith.

– Hesir persónar hava meira ella minni bevist latið vera við at gjørt nakran roknskap við tí avleiðing, at skattamyndugleikin hevur verið noyddur at mett um inntøku teirra.

– Teir hava so fingið skattarokning sendandi, men kortini hava teir ikki goldið.

– Soleiðis hevur tað koyrt í eini skeivari ringrás í áravís, til teir at enda eru komnir upp í nakrar milliónir í skattaskuld.

– Hesin peningur stendur sum ágóði í roknskap-inum hjá landskassanum og kommununum, men veruleikin er tann, at meginparturin er fiktivur peningur, tí lítil og eingin møguleiki er fyri at fáa peningin inn, sigur Tórfinn Smith.

– Tey erligu vinnurekandi, sum rinda sín skatt, hava ikki ein livandi kjans at kappast við persónar, sum meira ella minni bevist royna at snúgva sær undan skattaskuld, sigur Tórfinn Smith.

– Í øðrum londum verður seymur settur í hurðina, og löggávan forðar slíkum persónum í at halda fram við virksemunum.

– Her sær út, sum um alt gongur, tí hóast persónarnir hvørki hava gjørt roknskap og enn minni goldið nakran skatt, so halda teir fram, sum um einki var hent.

– Tí má galdandi log strammast munandi meira upp, so vinnurekandi,ið royna at snúgva sær undan skattaskuld, verða steðgað í góðari tíð, sigur Tórfinn Smith býráðslimur í Havn.

– Eitt uppakot var eina ferð á veg, sum kundi bett um hesi viðurskifti, men tað uppakotið varð oftur fyri politiskum máttloysi, og tí eru vit enn ongan veg komin, sigur Torfinn Smith.

– Mítt ynski er tí, at landsstyrsmaðurin við skattamálum tekur spurningin upp av nýggjum, so vit sleppa frá at sigga sumu persónar ferð eftir ferð søkja um eftirgeving av skatti, sigur Torfinn Smith.

– Eg kann ikki fyrstilla mær, at politisku flokkarnir ganga inn fyri hesum óskilinum, sum nú valdar.

– Tá tað hevur borið til at steðga slíkum í øðrum londum, sum eru munandi størri enn vit, so eigur tað eisini at bera til hjá okkum, sigur Torfinn Smith býráðslimur í Havn

Avmarkaður vøkstur í orkunýtsluni

Heita veðrið í fjør var høvuðsorsøkin til, at eftirspurningurin eftir orku bert hækkaði helvtina so nógv sum vanligt

ELI GUTTESEN

Eftirspurningurin eftir orku í øllum heiminum hækkaði bert 1,6 prosent í fjør. Hetta var bert helvtin av vekstrinum tey undanfarnu trý árini.

Olja er framvegis mest nýtta orkukelda í heiminum við einum marknaðarparti upp á 42 prosent.

Kol liggur á einum øðrum plássi, men marknaðarparturin minkaði ur 31 prosentum í 1996 til 27,8 prosent í 1997.

Kolnýtslan í Evropa lækkaði við 4,1 prosentum í fjør, og USA og Kina nýta framvegis meira enn helvtina av allari kolframleiðsluni í heiminum.

Eftir at stórur vøkstur hevur verið í gassnýtsluni seinastu 10 árini, minkaði bæði nýtsla og framleiðsla í fjør fyri fyrstu ferð síðan 1975. Høvuðsorsøkin til fallið í nýtsluni var tann lyggi veturin.

Við einum meira normalum veðurlag verður roknað við, at gass aftur gerst tað steinrunna brennievni, sum fer at hava størsta vøkstur.

Orkunýtslan sum stavaði frá kjarnorkuverkum minkaði í fjør fyri fyrstu ferð síðan 1965.

Afturgongdin í orkunýtsluni frá kjarnorkuverkum var 0,6 prosent í fjør og skyldaðist fyrst og fremst avmarkingar í USA og Kanada.

Vatnorka vinnur hin vegin alsamt marknaðarpart. Í miðal var í fjør talan um eina øking upp á 2,5 prosent, men stórur munur var frá einum heimparti til annan.

Til dømis hækkaði orku framleiðslan frá vatnmegi við 5,4 prosentum í Suður- og Millumamerika. Hetta skyldaðist fyrst og fremst veðurfyrbrigðið El Nino.

Oljuprísurin lækkaði

1997 var árið tá oljuprísurin lækkaði javnt og samt.

Meðan skrásetti prísurin á ráolju í okkara øki lá um 24 dollarar fyri tunnuna í byrjanini av árinum, varð ein tunna seld fyri minst enn 16 dollarar fyri tunnuna mót endanum av árinum. Síðani er prísurin fallin uppaftur longur nívur.

Eftirspurningurin eftir olju [illegible] við 2,1 prosentum í fjør. Dagligi eftirspurningurin var 71,7 milliónir tunnur av olju.

Samstundis øktust oljuframleiðslan við 3,1 prosentum í fjør. Dagliga framleiðslan kom sostatt upp á 72,2 milliónir tunnur, og samstundis var hetta stór sti framleiðsluvøkstur síðan 1988.

Kravdu 976 mió. kr. í avgjøldum í fjør

Meðan meirvirðisgjaldið minkaði við einari mió. kr. í fjør, so góvu onnur avgjøld undir einum 122 mió . kr. meira til landskassan

ELI GUTTESEN

Mest tyðandi avgjaldið hjá landskassanum í fjør var meirvirðisgjaldið á innflutningi.

Á hesi konto stóðu 577 mió. kr. við árslok í fjør, svarandi til 59prosent av samlaðu avgjøldunum.

Í mun til árið fyri var talan um ein vøkstur upp á 57 mio. kr.

Hin vegin gav sølu MVG-ið bert 19 mió. kr. ella 58 mió. kr. færri enn árið fyri.

Seð undir einum gav meirvirðisgjaldið sostatt eina mió. kr. minni í fjør í mun til árið fyri.

Helst eru fleiri orsøkir til hesa gongd. Øktar ilagur saman við nýggjum undantøkum í MVG-lógini hava óivað gjørt sitt til, at so lítið er komið inn í sølu-MVG í fjør.

Hóast vit hava roynt at fingið eina neyvari útgreining av MVG upphæddunum frá Toll- og Skattstovuni, fyri at forklára ógvuligu broytingarnar í tølunum, so er hetta ikki eydnast okkum enn.

Tollur o. a. hækkaði 122 mió. kr.

Innflutningurin øktist nógv í fjør, og hetta merktist eisini á toll-kontoini hjá landskassanum.

Tilsamans komu 185 mió. kr. inn í tolli í fjør, og var hetta 23 mió. kr. fleiri enn árið fyri.

Oljuavgjaldið, sum hevur verið stóðugt minkandi seinastu árini gav landskassanum 84 mió. kr. í fjør. Eisini her tódnar grundarlagið, tí alsamt fleiri vinnurekandi sleppa frá at rinda hetta avgjald. Avgjaldið virkar annars ávugt av priisgongdini á olju.

Økta bilsølan seinastu árini hevur eisini smittað av upp á inntøkurnar hjá landskassanum.

Skrásetingargjaldið, sum í 1994 gav landskassanum 7 mió. kr., gav í fjør landskassanum 57 mió. kr. Hóast talan var um eina lítla minking upp á 4 mió. kr. í mun til árið fyri, so er enn talan um tyðandi inntøku hjá landskassanum.

Nógvu nýskrásetingarnar av bilum siggjast eisini aftur í vegskattinum, hóast fleiri gamlir bílar eru skrottaðir seinastu árini. Tilsamans fekk landskassin 31 mió. kr. inn í vegskatti, og var hetta ein øking upp á 2 mió. kr. í mun til árið fyri. Vegskatturin hevur to ikki verið niðanfyri 28 mió. kr. øll tey seinastu árini.

Framleiðslugjaldini góvu landskassanum 15 mió. kr. í fjør. Hóast talan var um ein vøkstur upp á 2 mió. kr. síðan 1994, so er hetta minni enn helvtina av teimum 32 milliónunum, sum komu inn í 1991.

Hesi avgjøld stava fyri ein stóran part frá framleiðslugjaldum hjá føroyska bryggariunum.

Av øðrum kann nevnast, at lønheddaravgjaldið, gav landskassanum um 8 mió. kr., ferðsavgjaldið gav 7 mió. kr., og arvaavgjaldið gav 3 mió. kr.

Figgjarognaravgjaldið, sum gav landskassanum 113 mió. kr. í 1994 gav landskassanum bert eina mió. kr. í fjør.

Onnur avgjøld góvu landskassanum um 8 mió. kr.

Hvussu nógv bøturnar hava gvið landskassanum, er ikki greitt enn, men tey undanfarnu trý árini hevur upphæddin verið 16 mió. kr.